## DAGSINS MEINING

# Fólkaræðið er samstarv

Okkara stýrisskipan er fólkaræðilig. Onkur vil kanska mótmæla og siga sum so, at so leingi ríkismyndugleikar umsita føroysk stjórnarøki, so er skipann ikki fólkaræðilig. Men hvussu er og ikki, so er politiska skipanin í sjálvum sær fólkaræðilig, um vit hugsa um yvirtikin mál. Fólkaræðið er nakað av tí mest dýrmæta, ið vit eiga. Tað er tí av allrastørsta týdningi, at farið verður væl um fólkaræðið og um teir stovnar, sum eru stuðlar undir fólkaræði okkara.

Hvussu er støðan hesum viðvíkjandi nú eitt ár fer aftur um bak? Støðan kundi verið betur. Okkara stýrisskipan hevur nakrar aðalfortreytir. Skal einum sunnum fólkaræði verða lív lagað, er neyðugt at tey fólkavaldu virða hesar fortreytir. Ein meginfortreyt er, at landsins stýri endurspeglar veljarans vilja. Staðfestast kann uttan víðari, at sitandi landsstýrissamgonga ikki lýkur hesa fortreyt. Við tí samanseting, sum samgongan fekk, hava smáir flokkar fingið nógv meira vald enn teimum varð tillutað frá veljarans síðu. Sjálvsagt kann ein ikki útiloka smáar flokkar frá politiskari ávirkan, og soleiðis, sum skipanin nú einaferð er, verða småflokkar ofta at hava størri ávirkan, enn atkvøðutal teirra talar fyri. Er talan um flokk við drúgvari demokratiskari siðvenju og virðing fyri fólkaræðinum er hetta í sálvum sær eingin vandi. Talan kann enntá vera um eina styrki fyri fólkaræðið. Er talan hinvegin um intolerantar smáflokkar við fordøming og fundamentalismu í skyldri, eiga vit at tala at. Hetta er júst tað, sum er hent hjá okkum, at ein flokkur, ið hevur tikið patent uppá kristindómin hevur fingið lutfalsvís sera stóra ávirkan á føroyskan politikk og roynir at seta tíðina aftur á ávísum økjum. Hetta er ikki heilsugott fyri fólkaræðið. Tað er heldur ikki gott fyri fólkaræðið, at stórir flokkar geva slíkum smáflokkum stóra ávirkan bert fyri at varðveita valdið og halda øðrum stórum flokkum uttanfyri.

Tað eru onnur viðurskifti, ið eisini eru til bága fyri fólkaræðið t.d. hetta, at ávísir tingmenn og lutvíst flokkar við í dagliga tingarbeiðinum bera seg at á ódemokratiskan hátt. Vit hugsa um tað ófantaliga arbeiðslag, sum samgongan í fíggjarnevndini sýndi undir viðgerðini av fíggjarlógini fyri 2003. Hesin arbeiðsháttur avdúkaði vanvirðing fyri grundleggjandi demokratiskum virðum og princippum. Hesin sami arbeiðsháttur avdúkaði, at partar av samgonguflokkunum ikki taka sína uppgávu í álvara. Hesin margháttligi arbeiðsháttur avdúkaði, at ávísir tingmenn eru til reiðar at nýta síni mandat í innanflokks maktstríði og til at vinna partamonnum og politiskum mótstøðumonnum neisur. Víst kunnu teir sum tingmenn loyva sær slíkan atburð. Men er hetta gagnligt fyri fólkaræðið? Svarið er eftir okkara tykki nei. Fólkaræðið er samstarv. Samstarv innanflokka eins væl og millum andstøðu og samgongu. Soleiðis, sum samgongan ber seg at við innanhýsis klandri og við at seta andstøðuna uttan fyri alla politiska ávirkan ger hon seg inn á sjálvt støðið undir fólkaræðinum og hetta er bæði harmiligt og átaluvert. Vónandi síggja vit eitt betri fólkaræðiligt arbeiðslag í komandi ári. Sosialurin ynskir við hesum øllum føroyingum eitt gott nýggjár. Blaðið kemur út aftur fríggjadagin 3. januar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Jóla- og nýársheilsan frá psykiatrisku deild

**Birita og Kala**
*starvsfólk á Deild 5*

Ein partur av røktini hjá okkum á Deild 5 er sosial førleikavenjing. T.v.s. at stuðla teimum, so tey sjálvi megna sín gerandisdag, so sum at gera síni ørindi í bankan, keypa klæðir o.a. Eisini skulu vit hjálpa sjúklinginum at vera millum fólk, við at fara til tiltøk, so sum svimjing, framsýningar av ymsum slag o.a. Hetta er ein liður til eitt sjálvstøðugt og sosialt lív uttanfyri sjúkrahúsgátt.

Vegna tað at sjúklingarnir einans fáa u.l. 700,- í lummapeningi um mánaðin er omanfyrinevndu heilt ógjørligt. Lummapeningurin røkkur einans til teirra nýtslu av tubbak. Teir flestu sjúklingarnir roykja illa, helst fyri at doyva teirra sálarneyð.

Vegna manglandi pening førir tað við sær, at onkrir av okkara sjúklingum gongur í býnum og biður fremmandafólk um pengar. Við øðrum orðum ganga teir biddaragongd orsakað av síni støðu.

Fleiri av okkara sjúklingum hava sjúkuna skizofreni. Teir hava vegna teira sjúku/støðu sera lítla sjálvsvirðing. Omanfyrinevnda er ikki við til at styrkja hes.a

Átaluvert er eisini at hvørja ferð sjúklingarnir skulu hava klæðir, skal hann hava rekvisitión frá leiðsluni, orsaka av at teir ikki hava ráð til tess. Hetta er alt ov møtumikið fyri sjúklingin, so tað er altíð starvsfólk, ið tekur sær av hesum. Hetta forðar eisini okkum, í okkara arbeiði við sosialari førleikavenjing.

Ein partur av okkara mentan er eisini at geva hvørjum øðrum gávur til føðingardagar og til jóla. Hesari mentan kunnu sjúklingarnir als ikki taka lut í vegna manglandi pening.

Allir okkara sjúklingar hava valrætt (tá er eingin trupulleiki at finna psykiatrisku deild). Men hesir sjúklingar hava ikki rætt at verða limir í sjúkrakassanum, og kunnu sostatt ikki venda sær til kommunulækna um vanligar trupulleikar, ið vit onnur nýta kommunulæknar til.

Til seinast kann nevnast at vit hava 7 sjúklingar, ið eru liðugt viðgjørdir. Hesi búgva á Deild 4 vegna manglandi bústað/bústovnar. Vit halda at hesi fólk skulu hava somu rættindi sum onnur, ið búgva á bústovnum. Tey kunnu/skulu ikki svíða fyri at politiski myndugleikin ikki hevur nøkta tørvin á bústaði til hesi fólkini.

Tað er hugstoytt og syrgiligt, at ein minniluti í okkara samfelag er fyri einum slíkum vanbýti. Vit kalla okkum fyri eitt vælferðarsamfelag, men hvar er menniskjaáskoðanin hjá okkara hægstu tá deilast skal av lagkøkuni???

Gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

**P. S.** Vit hava skrivað sjúklingar, av tí at teir búgva á eini psykiatriskari viðgerðardeild.

# Nýggj fløga við dansitónleiki

TÍÐINDASKRIV

Ian Onghamar hevur útgivið nýggja fløgu við dansitónleiki, ið eftir einum av løgunum hevur fingið heiti, Dansa við mær.

Á fløguni eru 10 løg øll við føroyskum teksti. Felags fyri tekstirnar er, at teir eru nýskrivaðir við nýggjum løgum ella umsettum kendum løgum, sum ikki hava verið útgivin áður, (undantikið tey bæði løgini.: Eg skuldi verið Cowboy og.: Tað er leygarkvøld). Tekstirnir eru skrivaðir við einum líttlum skálki, so teir ikki verða ov tungir, ballaðir inn í rútmur sum eru ætlaðar til dansigólvið, eisini hjá teimun tilkomnu, tó við nútímans ljóði. Her kundi verið tikið fram, at ein annar útiseti Hans Jacob K. Mouritsen ið annars er púra ókendur innan tónleik, hevur gjørt bæði orð og løg til tveir sangir.: Dansa við mær og Bygdafrell.

Hví kemur hendan fløgan nú?

Síðani Ian fyrstu ferð, fyri eini 25 árum siðan (síðst í 1976 ella í byrjani av 77 ), fór at spæla til dans, í einum brúdleypið norðuri á Eiði, saman við Thormanni Kruse, og fyrst í 80'unum, saman við øðrum stovnaði bólkin DRIV, er ein stórur partur av fríðtíðini farin við at spæla til dans og veitslur, og altíð við stórari gleði.

Aftan á hesi mongu árini at hava spælt við í ymsum samansetingum av tónleikabólkum, bæði í Føroyum og millum útisetar í Danmark, til veitslur, almennan dans og serspælingar sum t.d. Dansifrøði, har mest hevur verið spælt eitt bland av: Evergreens, poppi, country, spælimannstónleiki, eitt sindur av heimagjørdum og tað, hann hevur fingið frá øðrum.

Eftir hesar spælingar hevur hann mangan fingið spurningin frá fólki um, hví hann ikki útgav eitt sindur av hesum heimagjørda "syngi-við-dansitónleiki" fyri tey tilkomnu, ið fyri tað nógva er við teksti og lýsingum um gerandisdagin og dansilívið í Føroyum hjá teimum, sum eru úr hansara egnu tíð. Tankin um eina innspæling hevur leingi ligið og lúrt, men er ikki blivin til nakað fyrr enn nú, ið kønir menn á økinum hava sagt honum, at nú er tíðin búgvin.

Tónleikurin kann kallast lættari dansitónleikur, sum altíð hevur verið væl umtóktur í Føroyum. Hóast hetta eru tað sera fáar útgávur tey seinastu mongu árini við tílíkum føroyskum tilfari. So henda útgáva vónandi gerst eitt gott ískoyti til breiddina í føroyskum tónleiki.

Tónleikarnir á fløguni eru m.a.
Kim Hansen, Flygil
Jóhannus á Rógvu Joensen, Bass,
Kassaguitar, Keyboard og forritan.
Ólavur Øster, El og Kassaguitar
Jóanis Erik Køtlum, (Fyrrv. Sjúkrahússtjóri) Harmonika
Mortan Zachariassen, Saxofon


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Ein jólaheilsan til øll tykkum sum vit ikki fingu takkað í fjør

**Maud Wang Hansen**



Nú eru jólini so farin aftur um í øllum góðum. At hugsa sær at longu er eitt heilt ár liðid síðani ræðuligu náttina, tá vit brókaleys og berføtt stóðu úti á vegnum í regni og kulda og sódu heim okkara fara upp í royk. Tað var náttina til 20. desembur 2002. Eg fór seint í song, tí eg vildi gleða børnini nú jólaferian hjá okkum byrjadi, eg gekk tí og pyntaði til jóla inntil seint á nátt. Ætlanin var at yvirraska børnini, tá tey vaknadu, og bilsin gjørdust tey tá tey vaknadu, men tíverri ikki á tann hátt, sum ætlanin var hjá mær.

Tey flestu eg kenni halda tað vera nakað serligt at pynta til jóla, eg sjálv havi altíð hav tað so, at eg goymi alt sum eg fái frá børnunum og serliga jólapynt og jólagávur. Tá so pyntingin fer fram, er tað sum at lesa søguna aftureftur. Øll tey minni sum liggja í hvørjum lítlum tingi, heilt frá mínum egna barnadópi til vøggustovutíðina hjá Villiami, Jónasi og Sonju og upp til nú. Sjálvt um fólk hava tað hugsan, at lutir eru deyð ting, so kemst ikki undan, at søgan hongur í teim lutum tú eigur og hevur samlað tær gjøgnum eitt heilt lív.

Ræðuliga ræðslan og vónloysi hesa náttina, hevur fest seg djúpt í okkara sinni, tað fer ongantíð burtur, men sárini lekjast og vit liva víðari. Vit eru ikki tey somu sum áður, lív okkara er broytt og vit við tí. Sjálvsamt sum tað liggur djúpt í einum, at koma víðari, at fáa jólini gjørd til eina góða høgtíð hóast alt, tað var tað sum lá mær mest á sinni. Eg hevdi ilt av børnunum, at síggja hvussu skelkaði tey vóru og hvussu spyrjandi tey hugdu uppá á meg og hvussu ómetaliga røsk tey vóru til bara at vera í tí sum var. Ringast var tað fyri Villiam, hann hevdi brent seg illa og einki var sum kundi bjargast hjá honum, hann hevði skuldarkenslur og var illa fyri av roykinum hann fekk í lunguni, tá hann fleiri ferðir royndi at fara inn aftur at sløkkja eldin. Vit fingu onkran skógv og onkur klædir at koyra uppá kroppin, men so at siga alt fór í ræðuligu flamminum. At vit øll sluppu út á lívi, var ótrúligt.

Ein maður stóð í túninum og bjóðaði okkum eini hús at vera í og segði at vit skuldu ikki stúra fyri jólinum, hann var frá tryggingini. Eg merkti ein tílíkan lætta við tankan um at vit ikki skuldu inn á onnur at liggja í øllum hesum hurlivasanum.

Teir dagarnir sum komu eftur hesa náttina vóru ikki stuttligir, vit vóru sera skelkað og fyngu ikki svøvn í nógvar nætur.

Telefonin kimaði alla tíðina, vinir og kenningar ringdu tá tey høvdu frætt um hendingina. Fólk komu á dyr og tað var ikki smávegis hvat vit fingu av gávum, bæði av pengum, mati, heimabakaðum smákøkum, klæðum, leikum og jólapynti. Børnini hava ongantíð fyrr átt so nógvar pakkar undir jólatræðnum. Ein kona ringdi og bað meg koma at fáa mær jólaklæðir úr handlinum hjá sær, eg var glað við og fór oman, men tá eg kom inn í handilin var tað so ørkimlandi at vita sær, at eg átti ikki so frætt sum undurklæðir ella sokkar.

Kend sum ókend komu á dyr og eingin orð vóru sum kundu siga frá hvat ein hugsaði. Tað var nóg mikið bara at sýggja eygnabráðini og at fáa eitt klemm. Í fyrstuni var tað sera torført at taka ímóti øllum gávunum og at siga takk, tí tað kendist sum var tað ikki nokk at siga, orð eru so fátøk. Ein ungur maður kom við fullum posum av gávum til tey smáu, hann vildi ikki siga hvørjum tað var frá, eg veit tað ikki enn, men eg fann tá út av, at tann einasti sum var at takka fyri alt hetta var Gud. Tí Gud er kærleikin og hetta var kærleiki vístur av menniskjum móti okkum í okkara svárastu sorg.

Hjartaliga takka vit tykkum øllum fyri tað tit gjørdu fyri okkum hesar dagarnar og í tíðini sum kom. Tað stórsinni sum liggur í føroyinginum skal man leita leingi eftur og ein finnur tað neyvan aðrastaðni.

Onkur helt at vit vóru heppin tí nú fingu vit nýggj hús, men trygvi mær eg vildi heldur haft tey gomlu húsini og verið hesa ræðuligu hending fyri uttan. Vit blivu ikki rík av tryggingarpengum ella sovorið, men vit hava fingið eitt deiligt heim bygt uppaftur og vit royna so við og við at fáa okkum teir lutir aftur, sum vit mangla, men jólapyntið kemur ongantíð aftur. Ein kann keypa nógv fyri pengar, men ikki minnir, kærleika og vinir.

Sum Kirkegaard segði: "Fyri at hjálpa einum øðrum persóni, mást tú kunna seta teg inn í støðuna hjá hinum fyri veruliga at skilja hvat hann fer ígjøgnum, annars er talan ikki um hjálp, men harafturímóti um at hevja sjálvan seg".

Ein serlig heilsan til Finnur og Jarnar, sum stutta tíð eftur okkara tilburð skuldu uppliva nakað sum eingin torir at hugsa um og sum samstundis er torført fyri onnur at tora at tosa um. Men sum sagt tað eru ikki orðini sum hava týdning, bert tað at fólk vilja vera um ein tá lívið gerst allar mest torført at liva.

Við hesum vilja vit ynskja tykkum øllum, sum á ein hvønn hátt stóðu okkum nær á jólum í fjør, eini gleðilig jól og eitt eydnuríkt nýggjár.

Kærastu heilsanir frá Sonju, Jónas, Villiam og Maud Wang Hansen, Tlf. 0045 8624 0082.

# Ítróttur 2002

**Schandorff Vang**
*Skjótisamband Føroya*
*Bogaskjótideildin*



Sum altíð hevur Útvarp Føroya sent ein samandrátt av, hvat er farið fram í ítróttinum her á landi í farna ári.

Eisini vit í Skjótisambandinum fingu teldupost, har vit vóru spurd um at koma við einum yvirliti, so sendingin kundi leggjast til rættis og sum sagt varð: "Vit rokna við, at eini tretivu/fjøruti fólk - umboðandi flest allar kappingargreinir - verða gestir í sendingini".

Vit svaraðu skjótt, men hoyrdu síðan einki aftur fyrr enn spurt varð um, hvat fór at henda.

Jú - soljóðandi svar kom (brot): "… at bogaskjóting verður ikki umrødd í sendingini í kvøld. Sama er við øðrum kappingargreinum. Okkum tykir, at heldur lítið er "at fara eftir" í summum kappingargreinum, nú tað ikki er oyggjaleikaár. Tveir tímar er trongligt, tá tú skalt umrøða føroyskan ítrótt í einum heilum ári, men tit vóru á tekniborðinum til einaferð seint í gjárkvøldið. Kanska fer onkur at halda, at vit gera ivaleysa nógv burtur úr ávísum kappingargreinum, men tað er so okkara prioritering. Sumt hevur størri og breiðari áhuga millum manna enn annað, og tað endurspeglast so eisini í slíkum sendingum. Vónandi skilja tit okkum".

Eg skilji tykkum væl, men skulu vit taka saman um tær vanligu ítróttarsendingarnar leygar- og sunnukvøld gjøgnum alt árið, so er tað ikki altíð, at alt verður tikið við har heldur, tí "tað er ikki pláss fyri tí", verður sagt frá tí útvarpsmanni, sum tekur ímóti. Og eingin ivi er um, at orsøkin einamest er fótbóltur - útlendskur fótbóltur.

Eg kann ikki siga, at vit í teimum ítróttarsendingunum hava verið beinleiðis við sviðið soð, tí vit hava fyri langari tíð síðan funnið útav, at vit skulu sjálvi senda alt skrivliga inn, so verður tað helst lisið upp.

Eg haldi meg minnast, at avtala er gjørd millum ÚF og ÍSF um, at ÚF skal taka við allan ítrótt við, um tilfar verður latið inn í góðari tíð. Men ferð eftir ferð er tað onkur ávísur, sum hevur hug at skúgva smáítróttin til síðis og raðfesta annarleiðis.

**Hvat bleiv umrøtt?**
Ítróttargreinarnar blivu umrøddar soleiðis: Fótbóltur 47% og 8 innsløg, har 23% av tí var um útlendskan fótbólt - ella 12% av allari sendingini. Kapproður 14%, harav 20% av tí var útlendskt - ella 3% av allari sendingini. Hondbóltur 10%. Svimjing 6%, har 72% var um altjóða døming - ella 5% av allari sendingini. Fræslur ítróttur, súkling og triatlon 5%. Talv og bridge 5%. Flogbóltur 4%, har umleið helvtin var útlendskt. Fjallaklintring 3%. ÍSB 3%. Doping 3%.

Íalt 9 ítróttargreinar + doping.

Eftir standa fimleikur, borðtennis, badminton, judo, bogaskjóting, byrsuskjóting, golf, kurvabóltur, tennis, karate, taekwondo, ríðing, froskmenn, dart og billiard. Íalt 15 ítróttargreinar. Havi eg gloymt nakað, biði eg orsaka.

Samanumtikið var nógv tann størsti parturin um fótbólt - ikki so merkiligt, um hugsað verður um tann eina vertin.

Men at raðfesta eina ítróttargrein so høgt í mun til øll hini er ikki rætt, tá vit hugsa um, hvussu nógva umrøðu fótbólturin fær gjøgnum alt árið. Heldur ikki er heilt rætt, at meiri enn 20% av allari sendingini er um reint útlendskt tilfar.

Eg tími ikki at fara nærri inn á, hvat eisini kundi veri við í sendingini, ella hvat kundi veri meiri umrøtt. Okkurt var meiri áhugavert enn annað at hoyra um - soleiðis er altíð hjá øllum. Tó haldi eg, at tær ítróttargreinar, sum vanliga ikki fáa so nógva umrøðu sum fótbólturin, áttu at fingið meiri pláss í tílíkari sending. Á handa hátt tit gjørdu, kundu tit líka so væl gjørt eina fótbóltsending burturav.

Vit í Skjótisambandinum ynskja øllum teimum umrøddu ítróttargreinunum alt tað besta - og øllum tí gloymda ítróttinum eisini.

At tað kemur eitt annað ár har tað kanska verður meiri at "fara eftir" í eini líknandi sending er ikki óvíst, men við hesi viðferð vit fáa ferð eftir ferð, so er óvíst um vit ynskja at luttaka.

Gott nýggjár øll somul - við ynski um eitt gott komandi ítróttarár.

# Yvirlýsing

**Føroya Musikklærarafelag**

Á aðalfundi hjá Føroya Musikklærarafelag varð viðtikið at gera vart við ta, eftir okkara tykki, tilvildarligu viðferð tónleikur fær í teimum elektronisku fjølmiðlunum.

Tónleikasendingarnar í Útvarp Føroya og Rás 2 eru aloftast í plátuvendarastíli (Vit hoyra/vit hoyrdu). Felags fyri hesar báðar rásir er eisini, at tað í størri ella minni mun, er ein forprogrammerað telda, ið spælir tónleik uttan íhald. Hetta kann bert síggjast sum ein háttur, uttan mið og mál, at brúka tónleik til at økja um senditíðina.

Rás 2 livir av lýsingum, og er tí ikki bundin av almennari upplýsing sum so. Men við ÚF er tað ørvísið. ÚF livir av lurtaragjaldið og hevur tí skyldu at upplýsa lurtararnar. (Public service). Eftir okkara tykki skal henda upplýsing fara fram á øllum økjum, ikki minst tí tónlistarliga. Fyri okkum sær tað út sum tónlistarliga programleggingin í ÚF, er fullkomiliga tilvildarlig. Nærum allar tónleikasendingar royna at raka eina so stóra lurtarafjøld sum gjørligt. Hetta letur seg bert gera, við at spæla sokallaðan lættan tónleik, og tí verða sendingarnar sjálvandi sera einstáttaðar. Tað sær út sum ein roynir at gera øllum til vildar í so at siga hvørjari tónleikasending. Hetta kann lættliga føra til tað mótsætta. At ein, møguliga stórur partur av lurtarunum, ikki fáa sín tónleikatørv nøktaðan.

Sjónvarp Føroya er eitt enn størri vónbrot, hvat tónleikasendingum við víkur. Har eru at kalla, ongar tónleikasendingar. Tá ið SVF vitjar Føroya størstu konserthøll, ta í Norðurlandahúsinum, er tað til onkra hissini ráðstevnu.

Okkara meting er, at vit eiga at geva børnum og ungum hollan kunnleika til tónleik sum heild. Sjálvandi vit sum tónleikalærarar fyrst og fremst, men ein almennir stovnar sum ÚF og SVF áttu eisini at sæð hetta sum sína fremstu upplýsingar og undirvísingarligu uppgávu. Skal hetta eydnast, er neyðugt við víðskygni og sera málrættaðari fyrireiking og ikki minst forstáðilsi fyri tí týdningi, hetta hevur fyri tónlistarligu framtíð okkara.